



# Angelica og Hilmar 80 ár

Í juli í fjør høvdu tey verið gift í 60 ár og kundu halda diamantbrúdleyp. Mánadagin 14. september í fjør fylti hann 80 ár, og nú mánadagin 1. mars fyllir hon 80 ár. Talan er um hjúnini Angelicu og Hilmar Danielsen, hon úr Havn og hann úr Húsavík.

Umframt at tey eru ein býarmynd í Havn, eru tey helst best kend frá Yamaha knallert- og skutarahandlinum í Bøkjarabrekku, sum tey róku í meira enn 30 ár.

Angelica sæst ofta í býnum við hundinum Silvu, umframt at hon gongur til Bingo í Pálsstovu.

Hon hevur faktiskt fingið sær ein nýggjan hund eftir at tann fyrri Silva doyði í fjør, 17 ára gomul.

Hilmar gongur høgt upp í fólbólt. Hann er íðin HB viðhaldsmaður, og í enskum fótbólti er Chelsea hansara lið. Hann hevur eisini bát, sum hann eisini gongur høgt uppí.

Hilmar og Angelica eiga 6 børn: Gunnbjørn, Beinta, Frants, Katrin, Jákup og Sámal. Barnabørnini eru 12 í tali og eitt langabba- og langommubarn.

-red

# Høgni Mikkelsen 60 ár

Mánadagin 1. mars fyllir Høgni Mikkelsen í Havn 60 ár.



Høgni er havnarmaður, sonur Sofie Dorthe Bendix, vanliga nevnd Bente, og Einar Mikkelsen el-installatør í Tróndargøtu.

Eftir lokna skúlagongd fór Høgni í læru sum elektrikari í fyritøkuni hjá pápanum í 1964. Tá hann varð útlærdur í 1969, fór hann á el-innleggjaraskúla í Keypmannahavn og fekk prógv í 1973. Síðan hevur hann arbeitt í fyritøkuni.

Eins og pápin hevur Høgni eisini stóran áhuga fyri handverkarayrkinum og serliga el-fakinum. Hann var eitt langt tíðarskeið nevndarlimur og formaður í Havnar Handverksmeistarafelag, umframt at hann hevur sitið í stýrinum fyri Tekniska Skúla og Føroya Handverksmeistarafelag. Høgni var eisini sýnsmaður ella sonevndur skuemeistari hjá elektrikaralærlingum frá 1981-2009. Hann var forseti í Lions Tórshavn 1998/99 og økisformaður frá 2000 til 2002.

Høgni giftist í 1977 við Sonju, dóttir Jeanne og Holger Jensen í Havn. Tey bygdu sær hús í Gæsugøtu í Havn og eiga børnini Bárður og Durita, umframt ommu- og abbadóttrina Maju.

Síðan 1980 hava Sonja og Høgni rikið el-fyritøkuna P/F EinarMikkelsen saman. Høgni hevur verið nógv at sæð á Vága Floghavn. Hetta kemst av, at fyritøkan í mong ár hevur havt ymiskar uppgávur har sum t.d. el-arbeiðið í sambandi við nýggja ljósskipan og aðrar trygdarskipanir tá ið lendingarbreytin bleiv nútímansgjørd síðst í 70-unum, umframt at fyritøkan hevur tikið sær av ymiskum trygdarskipanum á flogvøllinum. Annars hevur fyritøkan gjørt eitt ótal av el-innleggingum í virkjum og sethúsum, bæði í Havn og á bygd.

Í nógv ár hevur Høgni verið við í dansifelagnum Dansifrøi. Í løtuni er hann er formaður í bygginevndini í sambandi við at nýggj felagshús hjá Dansifrøi verða bygd í Gundadali. Felagshúsið verður eftir ætlan liðugt í summar, og tá verður 60 ára føðingardagurin hjá Høgna hildin har.

-red

## Dagurin

**26. februar. Ingigerð.** Kanska navn á franskari prinsessu, Ingardis, ið vit annars einki vita um. Navnið hevur fingið norrønan form, ið merkir *tann av guðinum Ing varda*. Janus Djurhuus varð føddur hendan dagin í 1881.

(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)



# 40 ára starvsdagur

Mánadagin 1. mars hevur Marjóna Djurhuus verið í starvi hjá Pf. Leif Mohr í 40 ár.

Marjóna hevur øll árini arbeitt í bókhaldinum. Frá bókhaldi ført við hond til nútímans telduskipanir. Serkenni fyri Marjónu hevur allan vegin verið hennara arbeiðssemi og nærlagni. Soleiðis hevur hon øll árini verið eitt av álitunum hjá Pf. Leif Mohr.

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Arnold Nielsen,** Strendur, fer úr Landssjúkrahúskapellinum fríggjdagin klokkan 16. Jarðarferðin verður úr Sjóvar kirkju leygardagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Arnold við blómum ella kransum, kunnu í staðin lata Sjóvar kirkju eina gávu. Konta í peningastovnunum.

**Heðin Hádal, Tórshavn,** andaðist á Landssjúkrahúsinum týskvøldið, 46 ára gamal. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum í kvøld kl. 18.30. Jarðarferðin verður úr Hoyvíkar kirkju leygardagin 27. februar kl 13. Tey, ið vilja minnast Heðin við blómum ella kransi, kunnu í staðin lata eina peningagávu til døturnar, konta í peningastovnunum.

**Kathrina Kjærbæk Jensen**, ættað úr Tórshavn, búsitandi í Miðvági, andaðist sunnudagin, 31 ára gomul. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Kathrinu, kunnu lata dóttrini eina gávu, konta í Suðuroyar Spærikassa

**Kim Joensen,** sonur Erlu Joensen í Vági, andaðist í Bergen sunnudagin 21. februar, 25 ára gamal. Jarðarferðin verður frá Sulheim kapell týsdagin 2. mars klokkan 13.30.

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra dóttir og systir okkara

**Kathrina Kjærbæk Jensen**
**ættað úr Tórshavn**
**búsitandi í Miðvági**

andaðist í heiminum sunnudagin, 31 ára gomul.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju leygardagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Jacoba, Christian, Herdis, Jákup , Valbjørn Derhard og Henny**

Tey, ið vilja minnast Kathrinu, kunnu lata dóttrini eina gávu, konta í Suðuroyar Sparikassa, 9870-703.602.8

# Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá ið okkara kæri pápi, verfaðir, abbi og langabbi

**Jógvan Evald Jacobsen,**
**Leirvík**

andaðist og varð jarðaður.

Takk til tykkum øll, sum á ymsan hátt hjálptu til við jarðarferðini. Eina stóra tøkk til Regin, Sylverius og Una Næs, prest, fyri góð og troystarrík orð. Takk til starvsfólkini á Giljagarði fyri, at tit tóku tykkum so væl av honum. Takk fyri blómur og peningagávur. Takk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Marjun og Rasmus**